# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Jóhannes S. Poulsen 90 ár

Í dag, 15. mars, fyllir hvalbingurin Jóhannes S. Poulsen, vanliga nevndur Johannes hjá Jettu, 90 ár.

Johannes var giftur við Sonny, sum doyði í 1988. Tey fingu trý børn Kammu, Finn Ejler, sum doyði hálvt ára gamal, og Jan. Johannes sigldi sum ungur, arbeiddi á landi í Íslandi og Grønlandi, var við at gera bergholið til Sandvíkar og skúlan í Hvalba. Hann arbeiddi heili 17 ár á Bacalao í Havn.

Johannes hevur verið av raskastu monnnum og er enn sum ein unglingi. Hann var ein av fyrstu harmonikuspælarum í Hvalba, og mest sum hvønn einasta dag tekur hann harmonikuna og undirheldur teimum gomlu á sambýlinum.



Dagurin verður hildin í sambýlinum í Hvalba frá 17.00 til 20.00.

## Heðin D. Poulsen á ting

Heðin D. Poulsen hevur tikið sætið á Løgtingið fyri Fólkaflokkin, meðan Óli Breckmann er í farloyvi í tíðarskeiðnum 10. til 19. mars 2005.

Heðin D. Poulsen er løgfrøðingur og formaður í Havnar Framburðsfelag, sum valfelag Fólkafloksins í Suðurstreymoy.

Til seinasta løgtingsval fekk Fólkaflokkurin tveir mans valdar í Suðurstreymoy, men av tí, at Bjarni Djurholm gjørdist landsstýrismaður, kom Poul Michelsen inn á ting, sum triðji maður á listanum.



Fjórða og fimta plássi fingu ávikavist Annika Olsen og Eli Christiansen, men av tí at hvørgin teirra fekk tikið sæti á Tingi hesaferð, vóru boð eftir Heðin D. Poulsen, sum nú er varamaður fyri Óla Breckmann.

Heðin D. Poulsen hevur latið løgtinginum tveir skrivligar spurningar, nú hann er løgtingsmaður. Tann fyrri er til Jógvan á Lakjuni, landsstýrismann í mentamálum, og hin Birgit Kleis, ríkisumboðsmann.

### Mikkjal, Jóannes og Mamy

Annars er fleiri varafólk komin á ting. Sverri Midjord hevur biðið um farloyvi og fyri hann er Mikkjal Sørensen komin á ting. Jørgen Niclasen hevur biðið um farloyvi og fyri hann er Jóannes Nielsen komin á ting. Vilhelm Johannesen hevur biðið um farloyvi og fyri hann er Mamy Dahl Sørensen komin á ting.

# Fundarøð í skúlanum á Velbastað

**Á skránni eru møtir fyri allar aldursbólkar. Til øll møtini luttaka góðar sangkreftir**

MØTIR
*Snorri Brend*

Fríggjakvøldið byrjar ein fundarrøð í skúlanum á Velbastað við heitinum "Er Gud ein veruleiki?".

Á fundunum luttaka Poul Færø, Eyðfinn Reyðberg, Sámal Mikkelsen og Jákup N. Olsen.

Sangur og tónleikur er sjálvandi við til slíkt møti, og verður hann á hesum sinni við MC Restorff og Kvartettini í Betesda í Klaksvík.



*Skúlin á Velbastað verður karmur um eina møtirøð komandi vikuskiftið*

Sunnudagin verður familjumøti fyri børn, ung og vaksin, har eisini ein søga verður fyri børnini.

Fríggjakvøldið og leygarkvøldið verða møtini kl. 20, meðan familjumøti sunnudagin byrjar kl. 14.

**Litmyndir av brúðarpørum í Vikuskiftis Sosialurin**

Sum nakað nýtt seta vit nú allar myndir av brúðarpørum, sum vera sendar til til teigin "Heilsanir", í Vikuskiftis Sosialin í **litum**.

Brúðarmyndirnar koma undir somu treytir sum aðrar myndir til "Heilsan-ir", t.v.s. at tær kosta 30 kr.

***Síðsta freist at lata brúðarmyndirnar inn er hósdag kl. 12.00***

**Sosialurin**

## *Rætting:*



## Trøini vórðu upprunaliga plantað í 1863

Í blaðnum 10. mars skrivaðu vit, at tey trý trøini við H. N Jacobsens Bókahandil eru plantaði í 1882. Hetta er bert deilvís rætt. Trøini vórðu upprunaliga plantaði í 1863, men træið í miðjuni kom seg ikki, og bleiv tí eitt nýtt træ plantað í 1882. Tað sæst eisini á myndini, ið er tikin í 1964, at tað træið er klænri og minni enn hini bæði.




## Dagurin

**15. mars. Sakarias**, deyður ár 752. Hann var grikki, ið var valdur til páva í 741. Hebráiskt navn, ið merkir: *Guð hevur minst til mín.*

15. til 21. mars vórðu róptir *gandadagarnir*. Teir vóru sera óálítandi til veður.

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum gleddu okkum á 80 ára føðingardøgunum

Takk fyri heilsanir, gávur og uppringingar. Takk øll, ið komu í føðingardag og gjørdu okkum dagin so hugnaligan.

Ein serstøkk tøkk til Tvøroyrar Hornorkestur, ið setti ein heilt serligan dám á

*Bestu heilsanir*

**Oluffa og Kaj Meyer, Tvøroyri**